


## ES kannar bankabjarging

ES-myndugleikarnir fara nú at kanna, um myndugleikarnir í Letlandi brutu reglurnar hjá samveldinum, tá teir valdu at bjarga bankanum Parex við at biðja evropeiska menningarbankan lata honum umleið 2,5 milliardir krónur í neyðhjálp. Nú seta kappingarmyndugleikarnir spurnartekin við bjargingina. Neelie Cross, sum umsitur kappingarviðurskifti í ES, sigur við BBC, at bjargingin hevur givið Parex møguleikar fram um aðrar letlendskar bankar. Altjóða fíggjarkreppan hevur rakt Letland ógvuliga meint og hevur biðið bæði ES og Altjóða Gjaldoyragrunnin IMF um hjálp.

## ES er vakrari uttanfyri

Íslendska umsóknin um limaskap í Evropeiska Samveldinum fær spanska blaðið El Pais at koma til ta niðurstøðu, at íslendski áhugin vísir, at fólk uttan fyri ES hava eina meiri jaliga uppfatan av samveldinum, enn fólk inni í samveldinum hava. Hóast Spania er ein av teimum størstu fiskivinnutjóðunum í ES, ger blaðið lítið burtur úr teimum íslendsku fiskileiðunum. Harafturímóti ger blaðið vart við, at íslendska fólkið og tess politikarar draga ikki eina línu í spurninginum um at fara upp í ES. El Pais heldur tað tó vera jaligt, at Ísland lýkur at kalla øll krøv fyri at fáa limaskap í ES.

# Ein frægd at vera til arbeiðis

**Tað sigur vakthavandi á politistøðini um friðarligu ólavsøkuna. Eingin harðskapur hevur verið, og løgreglan hevur mest sum bert verið noydd at tikið sær av fullum fólki**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Teir hava verið boðsendir oftani, men bert til smáttaríir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Síðani eftir miðdag ólavsøkuaftan til í morgun hevur løgreglan í 25 førum verið úti og tikið full fólk upp. Fýra persónar hava sovið rúsin av sær á politistøðini, onkur er koyrdur til hús, meðan tað hjá øðrum hevur verið nóg mikið at vakt tey aftur.

Ólavsøkuaftan var løgreglan úti 13 ferðir at taka upp full fólk og ólavsøkudag 12 ferðir. Í flestu førum lagaði tað seg tó við at vekja fólk aftur, meðan summi vórðu koyrd til hús. Sum til dømis ein 14-15 ára gamal drongur, sum útvið klokkan fimm í morgun sat og svav á einum bonki niðri við bátabrúgvarnar.

Sum nevnt vóru tað bert fýra fólk – harímillum ein ung genta – sum svóvu rúsin av sær í brummuni um ólavsøkuna, og tað er sambært vakthavandi óhoyrt fá.

Bert tvær fráboðanir vóru um nakað, ið kundi minna um ófrið. Løgreglan var boðsend til eitt skeinkistað, tá hesi lukkaðu ólavsøkumorgun. Tveir unglingar vóru vorðnir nakað ónøgdir um eitthvørt, og høvdu verið so mikið hóttandi, at løgreglan varð boðsend. Teir sissaðu seg tó tá løgrelgan kom á staðið, men teir verða so skuldsettir fyri brot á politiviðtøkurnar.

Í hinum førinum vóru tveir mans farnir upp at takast í Havnar Klubba um 03.30-tíðina, men tað var friður aftur, longu áðrenn løgreglan kom á staðið.

### Smávegis herverk

Var lítið av harðskapi, so var næstan enn minni av herverki. Og tað sum var, var bert smávegis.

Ólavsøkukvøld fekk løgreglan boð um, at ein maður gjørdi seg inn á ein parkeraðan bil. Hann hevði brotið síðurútarnar á bilinum, og hóast maðurin var rýmdur av staðnum, tá løgreglan kom, er sak skrivað í málinum.

Kvart yvir trý í nátt gjørdi ein annar maður seg inn á ein parkeraðan bil og hevði eitt nú brotið síðuspeglini. Eisini hann var rýmdur av staðnum.

Løtu seinni fekk løgreglan boð um enn ein mann, ið gjørdi seg inn á ein bil. Hann hevði sæð seg illan inn á bilin og stóð framvegis og sparkaði inn í síðuna á bilinum, tá løgreglan kom á staðið og tók hann.

Og klokkan gott seks í morgun fekk løgreglan boð um nakrar mans, ið vóru í ferð við at avmontera flaggstengur í miðbýnum og gera seg inn á ein pylsuvogn. Hesir vóru rýmdir, tá løgreglan kom á staðið. Flaggstengurnar lógu har, og sama var við pylsuvogninum, so løgreglan ger ikki meiri við hetta málið.

### Mentalitetsbroyting

Annars var eitt minni ferðsluóhapp í vesturbýnum beint eftir miðnátt ólavsøkuaftan, tá ein eldri kona rendi á ein parkeraðan bil. Tað stóðst bert smávegis skaði av. Konan fekk tó smærri snuddir, og løgreglan kundi staðfesta, at førarin var ávirkaður av rúsdrekka.

Ein annar bilførari varð steðgaður um hálvgum fimm tíðina í morgun, og hann er nú skuldsettur fyri at koyra ávirkaður.

Av øðrum kann nevnast, at sjúkrabilar nakrar ferðir vórðu boðsendir um ólavsøkuna. Talan var tó heldur ikki í hesum førunum um nakað álvarsligt, og í flestu førum høvdu samarittar viðgjørt fólkini, áðrenn sjúkrabilurin kom fram.

Í morgun var løgreglan á einum útiskeinkistað, har ábyrgdarfólkini vóru farin heim uttan at avmontera alt, so fólk ótarnað kundu tappa sær ókeypis øl. Ábyrgdarfólkini vórðu boðsend og komu at beina alt burtur.

So alt í alt var hetta hin friðarligasta ólavsøkan, sum vakthavandi hevur upplivað.

- Nógv fólk var í býnum, men alt gekk sum nevnt friðarliga fyri seg, og tá nógva regnið kom ólavsøkuaftan, tyntist skjótt út í mannamúgvuni, og út á morgunin var mest sum menniskjatómt í Havnar gøtum, sigur vakthavandi á politistøðini.

Hann heldur, at tað er farin fram ein mentalitetsbryting seinastu árini.

- Fyri 15-20 árum síðani vóru tað fleiri, sum fóru á ólavsøku við tí fyri eyga at berjast og gera balladu. Hendan ólavsøkan hevur verið hin friðarligasta, sum eg veit um, og eg má siga, at tað hevur verið ein frægd at verið til arbeiðis hesar dagarnar, sigur vakthavandi á politistøðini.

# Kvinnuligir skiparar

**Tað er einki óvanligt í, at kvinnur dansa føroyskan dans. Heldur ikki er tað óvanligt, at tær eisini skipa, men at ein kvinna skipar brúðarvísuna man hoyra til raritetirnar**

BRÚÐARVÍSA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

So vítt undirritaði hevur fingið uppspurt, er tað neyvan hent áður, at ein kvinna hevur skipað donsku brúðarvísuna. Tað er tó komið fyri, at ein kvinnuligur skipari hevur verið til føroysku brúðarvísuna, men tað hendir kortini heldur ikki á hvørjum degi.

Væl eiga vit kvinnuligar kvæðakempur, og tiltikin man Elin Lamhauge úr Runavík vera. Hon er ein einari innan kvinnuligar kvøðarar, og ræðist ikki fyri at skipa Brynhildartátt, eitt kvæði upp á 232 ørindir, sum er trý ørindi fleiri enn Fuglakvæðið.

Í brúdleypi leygarkvøldið í Pálsstovu skipaði Súsanna Hansen úr Nólsoy donsku brúðarvísuna, og tað var fyrstu ferð at so frægur kvøðari sum Martin Tórgarð hevði upplivað, at ein kvinna skipaði donsku brúðarvísuna. Í sama brúðardansi skipaði enn ein kvinna, Tanja Poulsen, Harra Pætur og Elinborg, so tað vóru kvinnur burturav, sum skipaðu brúðardansin hetta kvøldið.

At Pálsstova so ikki er bygd við føroyskum dansi fyri eyga, er so ein onnur søga, men hóast út av lagi vánaligu akustisku umstøðurnar, gekk dansurin væl.

Tað er eyðvitað óneyðugt at leggja aftrat, at hetta sjálvandi var fyrstu ferð, at Súsanna Hansen skipaði brúðarvísuna, tó at hon á ongan hátt er óvon við at skipa.



*Súsanna Maria Hansen skipaði donsku brúðarvísuna í brúdleypi leygarkvøldið*
*Mynd: Heri Joensen*